HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26
600 Saltangará

16. mai 2018
**Mál**: 17/00822-14
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: HH

***Góðkenningarskriv***

**Serstøk byggisamtykt fyri bygging yvir turrdokkina á Skála**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Runavíkar kommuna í skrivi, dagfest 3. oktober 2017, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri bygging av høll yvir turrdokkina hjá MEST á Skála til góðkenningar.

Ætlanin við serstøku byggisamtyktini er at kunna byggja eina høll oman yvir turrdokkina á Skála. Ætlanin er, at høllin skal verða 129 m long, 47 m breið og 40,4 m høg.

Uppskotið til serstøku byggisamtyktina fyri bygging av høll yvir turrdokkina hjá MEST á Skála hevur ligið alment frammi frá 6. til 27. juni 2017. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 18. juli 2017, hevði kommunan móttikið tvey mótmæli, eitt við 129 undirskriftum og eitt við tveimum undirskriftum.

Mótmælini snúgva seg m.a. um, at ein so stór høll fer at lýta bygdina, og at málið ikki er nóg væl lýst, t.d. at myndirnar, sum vórðu lagdar fram á borgarafundinum vóru misvísandi. Harafturat er víst á onnur viðurskifti, so sum óljóð og trygdarviðurskifti. Runavíkar kommuna tók ikki mótmælini til eftirtektar.

Harumframt hevur landsstýriskvinnan móttikið skriv, dagfest 11. januar 2018, undirskrivað av 11 borgarum á Skála, har heitt verður á landsstýriskvinnuna um at havna ynskinum hjá Runavíkar kommunu, um at gera serstaka byggisamtykt fyri bygging av høll yvir turrdokkina hjá Mest á Skála. Víst verður í skrivinum á manglandi kunning, endurgjaldskrav o.a.

***Lýsing av málinum***

Málið varð fyrstu ferð viðgjørt á heysti 2016. Skotið varð tá upp, at eingin avmarking skuldi vera fyri, hvussu høgt kundi byggjast.

Mælt varð tá til, at øll bygging á økinum við eini hædd oman fyri 15 metrar, skuldi vera sambært serstakari byggisamtykt. Eisini varð hildið, at bygging av eini so høgari høll nærhendis íbúðarøki er eitt so stórt inntriv, at tað skuldi lýsast væl fyri borgarunum, eitt nú við myndum, sum vísa bygging ymsastaðni frá á Skála og hinumegin fjørðin.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

Runavíkar kommuna skipaði hin 23. mai 2017 fyri almennum fundi um ætlaðu høllina, har m.a. eftirgjørdar myndir vórðu vístar av høllini ymsastaðni úr bygdini.

***Viðmerkingar frá Býarskipanarnevndini***

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og hevur í ummæli sínum, dagfest 26. mars 2018, mælt til, at serstaka byggisamtyktin fyri bygging yvir turrdokkina á Skála verður góðkend.

Nevndin hevur hesar viðmerkingar.

Býarskipanarnevndin hevur viðgjørt málið á fundum 19. okt., 2. nov., 19. des. 2017, 12. feb. og 8. mars 2018. Nevndin hevur í hesum sambandi havt fund við umboð fyri Runavíkar kommunu og Kontrast arkitektar, sum hava gjørt eftirgjørdu myndir av, hvussu høllin sæst í umhvørvinum.

Nevndin ásannar, at:

- ætlaða høllin fer at fylla nógv í bygdarmyndini, og fer at skerja útsýnið í pørtum av bygdini,
- at myndirnar, ið vóru partur av tilfarinum, sum hevur ligið frammi, ikki til fulnar vísa røttu myndina av ætlaðu høllini.

Nevndin ásannar eisini, at:

- skipasmiðjan á Skála er ein týðandi partur av bygdini,
- at økið í galdandi byggisamtykt longu er lagt út til skipasmiðjuvirksemi,
- og at ein høll yvir turrdokkini, eisini fær jaligar avleiðingar fyri bygdina, eitt nú at arbeiðsumstøðurnar verða munandi betri, og at útlát av dálkandi evnum kann minkast.

Nevndin heldur ikki, at nýggjar myndir av ætlaðu høllini fara at hava avgerandi ávirkan á støðutakan.

***Viðmerkingar frá Heilsu- og innlendismálaráðnum***

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri bygging av høll yvir turrdokkina hjá MEST á Skála.

Hjálagt rættaður byggisamtyktartekstur fyri Runavíkar kommunu við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum

Mint verður á, at hóast Heilsu- og innlendismálaráðið nú ætlar at góðkenna serstøku byggisamtyktina eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Hugsað verður serliga um friðingarmyndugleikan, sum arbeiðir eftir reglunum í náttúrufriðingarlógini (l.l. nr. 48 frá 9. juli 1970).

Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð, sum er soljóðandi :

*§ 1. Kommunustýrir kunnu ikki geva byggiloyvi ella nýtsluloyvi, fyrr enn tað er staðfest, at tað sum søkt verður um, eisini kann góðkennast av øðrum myndugleikum, ið sambært aðrari lóggávu hava heimild at seta krøv til byggingar.*

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI DOKKHØLL OMANYVIR TURRDOKKINA Á SKÁLA

**Broytt sambært viðtøku í byggi- og býarskipanarnevndini 15. mai 2017**




Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er at opna møguleikan fyri at byggja eina høll omanyvir turrdokkina á Skála

## § 1. Endamál

1.1. At skipað økið sum serstaka byggisamtyktin fevnir um til bygging av høll omanyvir turrdokkina á Skála.

## §2. Heimild og avmarking

2.1. Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013.

2.2. Økið, ið serstak byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1.

2.3. Byggjast kann sambært viðfestu tekningum:

| | |
|---|---|
| TK(99)1.01 B | dagf. 09/22/16 |
| TK(99)3.01 | dagf. 09/20/16 |
| TK(99)3.02 | dagf. 09/21/16 |

2.4. Sambært býarplaninum fyri Skála, liggur dokkin Í D22-øki

2.5. Sambært kap. VII, §4 í almennu byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu, er D22- øki lagt til havnaendamál, skipasmiðjur og umvæling av skipum v.m.

2.6. Sambært kap. V, §1, stk. 1 í almennu byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu, er heimild at gera serstakar byggisamtyktir við t.d. ásetingum um byggi- og nýtingarstig og hæddir á húsum.

## § 3 Nýtsla økisins

3.1. Økið skal nýtast til bygging av høll omanyvir turrdokkina á Skála.

## § 4 Bygging, stødd og staðseting

4.1. Mest loyvda bygging er sambært viðfestu tekningum:

| | |
|---|---|
| TK(99)1.01 B | dagf. 09/22/16 |
| TK(99)3.01 | dagf. 09/20/16 |
| TK(99)3.02 | dagf. 09/21/16 |

4.2. Kommunan tilskilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygninginum í sambandi við viðgerð av byggiloyvinum.[1]

## §5 Byggimynduleiki og átalurættur

5.1. Byggimynduleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Runavíkar kommunu einsamallari

## §6 Undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar

6.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

6.2 Broytingar í hesi byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 17/00822 |
| Ætlanarskriv: | 8/5-2018 |
| Góðkent: | 16/5-2018 |
| Váttað: | |

[1] Grein 4.2. er sett inn í serstøku byuggisamtyktinia sambært viðtøku í byggi- og býarskipanarnevndini 15. mai 2017




hmp CONSULT
ANLEGGSVERKFRØÐI

ÓLUVUGØTA 12 - 100 TÓRSHAVN, TLF: 309210, FAX: 31 83 46, HMP@HMP.FO

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SAK | MEST | | | | | SAK NR. | 16-039 |
| EVNI | DOKKHØLL Á SKÁLA | | | | | DAGF | 09/21/16 |
| | LONGDARSKURÐUR | | | | | MÁT | 1 : 500 |
| TEKNAÐ | ÓSL | KANNAÐ | Checker | BROYTT | Checker | TEKN NR | TK(99)3.02 |




ANLEGGSVERKFRØÐI
ÓLUVUGØTA 12 - 100 TÓRSHAVN, TLF: 309210, FAX: 31 83 46, HMP@HMP.FO

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SAK | MEST | | | | | SAK NR. | 16-039 |
| EVNI | DOKKHØLL Á SKÁLA | | | | | DAGF. | 09/20/16 |
| | TVØRSKURUR | | | | | MÁT | 1 : 200 |
| TEKNAD | ÓSL | KANNAD | Checker | BROYTT | Checker | TEKN. NR. | TK(99)3.01 |





hmp CONSULT
ANLEGGSVERKFRØÐI
ÓLUVUGØTA 12 - 100 TÓRSHAVN, TLF: 309210, FAX: 31 83 46, HMP@HMP.FO


| | | | |
|---|---|---|---|
| SAK | MEST | SAK NR. | 16-039 |
| EVNI | DOKKHØLL Á SKÁLA<br>GRUNDPLAN | DAGF | 09/22/16 |
| | | MÁT | 1 : 500 |
| TEKNAD ÓSL | KANNAD Checker | BROYTT 04.10.2016 | TEKN NR TK(99)1.01 B |